Skúlin í Hvalba stongdur vegna sjúku

Ein hervilig fepursjúka herjar í hesum døgum í pørtum av Suðuroynni. Serliga í Hvalba liggja mong við høgum fepuri, og skúlin hevur verið stongdur í tveir dagar av tí sama

SKÚLI
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Hvalbiar skúli hevur verið stongdur í tveir dagar vegna sjúku. Óvanliga mong eru sjúk í Hvalba, og tað frættist eisini um aðrar í bygdir, har mong fólk liggja við høgum fepuri

Mynd: Áki Bertholdsen

Úr Hvalba frættist, at um ein triðingur av børnunum í skúlanum eru sjúk. Tað ganga gott 100 næmingar í skúlanum og tíggju lærarar, har seks av teimum eru sjúkir. Sostatt var ikki annað at gera mánamorgunin enn at senda tey børnini, sum vóru komin í skúla heimaftur og stongja skúlan vegna sjúku. Tað merktist væl, at nógv eru sjúk, tí tað var ikki bara sum at siga tað at fáa fatur á nøkrum, sum kundi greiða frá, hvat er hent. Skúlastjórin liggur eisini, men tað eydnaðist so at fáa fatur á skúlatænaranum, Kaj Berg.

– Hetta er fyrstu ferð í søguni hjá Hvalbiar skúla, at hann er stongdur vegna sjúku, sigur hann. Og hann undrast stórliga á hetta, tí tað eru heilt óvanliga mong sjúk.

Hann greiðir frá, at fólk hava nógvan fepur.

– Tvær abbadøtur hjá mær liggja báðar við yvir 40 í fepuri. Og sum eg havi skilt, so liggja øll har um í fepuri, greiðir hann frá.

Hann sigur, at fólk gremja seg um pínu í búkinum og høvdinum. Læknin hevur sagt, at tey liggja helst einar tríggjar til fimm dagar. Men sum skilst so hava summi ligið longri enn tað.

Kaj Berg veit tó ikki, hvussu longi skúlin í Hvalba verður stongdur.

– Skúlin var so stongdur mána- og týsdagin, men hvussu nógvar dagar afturat, tað veit eg ikki. Hetta er sera løgið, sigur hann.

Talan er helst um eina fepursjúku, sum hevur rakt serliga Hvalba og Sandvík hart. Men um sjúkan fer at breiða seg, kann bara tíðin vísa. Skúlatænarin í Hvalba veit tó at siga av Tvøroyri, at har eru lærarar eisini við at leggjast sjúk, men hvussu nógvir, tað visti hann ikki.

Signar Dam, kommunulækni, sigur, at tey hava ikki merkt nakað til sjúkuna enn.

– Vit hava ikki havt fleiri tilkallingar enn vanligt, sigur hann. Men hann hevur hoyrt um, at tað liggja óvanliga nógv sjúk í Hvalba.

Nú sæst ein endi á arbeiðinum

Seinastu tíggju árini hevur skúlin á Ziskatrøð í Klaksvík rætt og slætt sæð út sum eitt byggipláss. Eitt umfatandi umvælisarbeiði av skúlanum bæði innan og uttan hevur tikið sína tíð, men nú hómar skúlastjórin, Asbjørn Lómaklett, ein enda fyri framman

SKÚLI
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Fyri fyrstu ferð í 10 ár sær skúlin á Ziskatrøð ikki út sum eitt byggipláss. Hóast arbeiðið kemur at taka eini trý ár afturat, so sær skúlin næstan út, sum hann er nýggjur í dag

Klaksvík: Skúlin á Ziskatrøð er broyttur nógv seinastu mongu árini, hóast so gott sum onki er bygt afturat. Skúlin var í so vánaligum standi, at tað er ófatiligt, at hann hevur verið nýttur. Men har ganga yvir 400 næmingar, og tað er ikki bara sum at siga tað at finna onnur gegnaði høli til tey. Sostatt hevur arbeiðið uppá at fáa hann nýtiligan sum skúla aftur, so at siga bert hevur kunnað verðið gjørt í summarfrítíðini. Og tí hevur tað eisini tikið sína tíð. Tað sæst ein endi á tí nú, men tað er ikki liðugt enn.

Nú er umleið helmingurin av skúlanum klæddur og inni hava allar stovurnar fingið nýggjar møblar. Tað mangla tó 14 stovur enn at verða gjørdar av nýggjum. Hinar eru allar fullkomuliga nýggjar. Og gongirnar somuleiðis.

Skúlin er í trimum hæddum, og tvær tær ovastu eru gjørdar. Arbeiðið upp á stovurnar á niðastu hædd byrjar komandi ár, og so skuldi skúlin verið so gott sum nýggjur innan allur, sum hann er. Og so er uttandura arbeiðið eftir eisini. Onki klæðningsarbeiði er gjørt í ár, tí tað vóru ikki pengar ella stundir til tað. Og tí varð gjørt av at mála skúlan fyri at fríðka um hann. Tí hann var ikki vakur frammanundan – og serliga ikki eftir at partar av honum vórðu klæddir, meðan aðrir partar stóðu eftir við tí gomlu og slitnu málingini. Tað sá ikki gott út, men tann nýggja málingin hevur bøtt munandi um støðuna.

Tað seinasta sum er gjørt nú í summar, er alisfrøðistovan og fýrrúmið í kjallaranum.

Frammanundan var ein alisfrøðistova og ein lívfrøðistova á ovastu hædd í skúlanum. Tær báðar stovurnar eru við síðuna av hvørji aðrari, men mugu sigast at hava verið sera lítlar serstovur. Í dag eru tær báðar lagdar saman til eina stóra alisfrøðisstovu, har allir nýmótans hentleikar innan lærugreinina verða at arbeiða við.Og hetta fegnast skúlastjórin sum vera man um.

– Nú fara vit at hava eina rættuliga alisfrøðisstovu, har næmingarnir kunnu gera allar uppgávurnar, sum teimum verða áløgdar í bókunum, sigur hann.

Tað verður ikki heilt enn, at stovan verður tikin í nýtslu, tí enn stendur hølið tómt. Skúlastjórin væntar, at stovan verður liðug seinast í september, so tá verður klárt hjá næmingunum at taka hana í nýtslu.

Hitt stórarbeiðið, sum varð gjørt við skúlan í ár, er fýrrúmið. Allur hitin er lagdur um av nýggjum, nýggj oljufýr og grivið er eisini út í fýrrúminum, so at tað er heilt nakað annað enn tað lítla tronga rúmið, sum tað var frammanundan.

Trivnaðurin batnar

Hetta at skúlin nú er í so góðum standi, ger sjálvandi sítt til, at bæði næmingar og lærarar eru farnir at trívast betur. Og skúlastjórin viðgongur, at tað er gott, at skúlin ikki longur líkist einum byggiplássi. Og tað er ikki ilt at ímynda sær, tí tað munnu vera fá, sum hava gingið fram við skúlanum og ikki hugsað sítt.

Men tað er so ein farin tíð, og í ár er tað fyrstu ferð í tíggju ár, at ein fyrsti flokkur ikki er byrjaður á einum byggiplássi.

Asbjørn sigur, at hóast tað er nakað langt eftir á mál, so er skúlin í dag sum ein annar.

Høvuðsorsøkin til, at skúlin bleiv í so ringum standi, er, at skúlin lak so illa. Bygningurin er so høgur, og betongveggirnir megnaðu ikki at halda tætt, tá regnið oysti niður og harafturat fór eisini at leka um vindeyguni.

– Og øll vita jú, at fíggindi nummar eitt hjá húsum er jú vatn. Alt upployst innan, og standurin blevi hareftir, sigur skúlastjórin.

Tí varð byrjað við at klæða bygningin oman og niðan, tí hann er altíð undir harðast trýsti, tá vindur og regn er. Tað ráddi um at fáa bygningin tættan, áðrenn nakað bleiv gjørt innan.

Men onki av hesum varð gjørt í ár. Í ár var tað fýrrúmið og alisfrøðisstovan – og so vóru stundir til at mála restina av skúlanum uttan.

Tá skúlin á Ziskatrøð er liðugt umvældur, verður samlaði kostnaðurin einar 25 til 30 milliónir krónur. Men tað er munandi minni enn tað hevði kostað at bygt ein nýggjan skúla.

Her er eitt dømi um broytingina, sum er farin fram. Niðasta hæddin er ikki gjørd í stand enn, men tað verður væntandi komandi summarfrítíð, og so er so gott sum alt gjørt innan

Landsverkfrøðingurin leggur øll kort á borðið

– Tað er ógvuliga óheppið, at ein løgtingsmaður sáar misálit á ein almennan stovn, sigur Landsverkfrøðingurin um Henrik Old

HOVSTUNNIL
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Vit krógva onki, og ber tað til at gera tunnilin niðri í dalinum, skal ongin ivi vera um, at vit fara at mæla til at gera Hovstunnilin har, sigur Oyvindur Brimnes, Landsverkfrøðingur

– Vit krógva onki.

Oyvindur Brimnes, Landsverkfrøðingur, heldur ikki, at tað er nøkur sum helst orsøk tilat sáa iva um arbeiðið hjá stovninum.

Men hann heldur at tað er óheppið, at enntá ein løgtingsmaður í farnu viku, alment sáar iva um kanningarnar hjá Landsverkfrøðinginum í sambandi við, hvar ætlaði Hovstunnilin skal borast.

Hann sipar til Henrik Old, løgtingsmann, sum eisini er formaður í vinnunevnd løgtingsins.

Í Sosialinum í farnu viku helt Henrik Old, at Landsverkfrøðingurin alla tíðina hevði havt ein illvilja ímóti at bora tunnilin niðri í dalinum, har norska felagið, NCC hevur bjóðað sær til at gera hann.

Og tí róði løgtingsmaðurin eisini framundir, at Landsverkfrøðingurin fór at mála eina svartari mynd av støðuni, enn hon veruliga var, fyri at "prógva", at tað bar ikki til at gera bergholið har.

Hann hevði tískil ikki serliga stórt álit á, at Landsverkfrøðingurin fer at koma til eitt óheft úrslit av teimum boriroyndum, sum nú verða gjørdar.

Eitt, sum løgtingmaðurin eisini styðjaði seg til, var, at tað nú hevði tikið eitt hálvt ár at gera royndarboringarnar og hetta tók hann sum eina roynd hjá Landsverkfrøðinginum at drála sum longst.

Hann vísti eisini á, at Landsverkfrøðingurin hevur longu boðað frá, hvussu vánaligt tilfarið í fjallinum er. Og hann helt at hetta var fyri at mála eina so svarta mynd av støðuni, sum gjørligt.

Tí vildi Løgtingsmaðurin hava, at ein púra óheftur stovnur skuldi kanna tilfarið, sum er fingið úr fjallinum í boriroyndunum og hann metti málið so álvarsligt, at hann ætlar at reisa tað í Løgtinginum.

Øll kort á borðið

Men hetta heldur Landsverkfrøðingurin er heilt burturvið.

Í fyrsta lagið heldur hann, at tað er sera óheppið, at ein løgtingsmaður alment sáar misálit á ein almennan stovn. Vit hava onki ímóti, at funnist verið at okkum, men vit eru ein partur í politisku skipanini og var løgtingsmaðurin ónøgdur, átti hann at tikið tað upp við landsstýrismannin, heldur enn at fara í bløðini.

Hann sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur ikki málað eina svarta mynd av teimum kanningum, sum nú verða gjørdar.

– Tað hava vit ikki gjørt. Tað einasta, vit hava sagt, er, at ein orsøk til kanningarnar hava drigið út, er, at í tí eina holinum, vit boraðu, var tilfarið so vánaligt, at teir máttu gevast. Annars hava vit eisini gjørt greitt, at vit gera onga niðurstøðu, fyrrenn tilfarið er kannað. Fyri okkum er tað sjálvsagt, at vit kunnu ikki gera eina niðurstøðu, fyrrenn tilfarið er kannað.

Henrik Old fýlist eisini á, at kanningarnar hava tikið eitt hálvt ár, hóast landsverkfrøðingurin í vár segði, at tað kom at taka hálvanannan til tveir mánaðir?

– Hetta er ikki rætt. Í vár kom fram, at norska felagið NCC skuldi havt bjóðað seg til at gera tunnilin niðri í dalinum.

Síðani varð tann tunnilslinjan viðgjørd og tað tók eitt sindur av tíð. Úrslitið var, at NCC vildi ikki átaka sær fíggjarliga váðan av, at tilfarið í fjallinum kanska var verri enn frammanundan mett.

– Og tá ið landkassin skuldi hava fíggjarliga váðan, kundu vit, sum tekniskur ráðgevari, ikki mæla til at fara undir borið, fyrrenn tilfarið í fjallinum varð kannað, so at vit vistu til fulnar, hvat vit fóru í holt við.

Tað var eisini hetta, sum ráðgevarin hjá Landsverkfrøðinginum, Statkraft Grøner í Noregi, mælti til.

– Sostatt var tað ikki, fyrrenn beint fyri verkfallið, at vit boð um at fara undir royndarboringarnar.

– Tað tekur eitt sindur av tíð at rigga til, men so kom verkfallið og alt mátti riggast av aftur. Verkfallið tarnaði arbeiðnum í meiri enn ein mánað og tá ið tað var liðugt, mátti riggast til av nýggjum.

– Harafturat var tað eina holið so vánaligt, at teir máttu gevast og eisini tað seinkaði arbeiðnum í nakrar vikur.

Oyvindur Brimnes sigur, at sostatt hava sjálvar boringarnar tikið minni enn tveir mánaðir.

Hann sigur, at tá ið royndarboringarnar eru lidnar, skal Statkraft Grøner kanna tilfarið í samstarvið við Jarðfrøðisavnið.

–Hetta eru feløg og stovnar, sum als onki fíggjarlig áhugamál hava og óheftari stovnar at kanna tilfarið enn tað, ber neyvan til at finna.

Landsverkfrøðingurin sigur annars, at Landsverkfrøðingurin fer avgjørt ikki at krógva nakað.

– Vit leggja sjálvsagt øll kortini á borðið og er tað onkur, sum hevur hug at kanna tilfarið, tá ið royndarboringarnar eru liðnar, verður tað ongin trupulleiki, leggur hann afturat.

Ongin ivi

Men Landsverkfrøðingurin heldur eisini, at tað er als ongin orsøk til at sáa iva um framferðina hjá stovninum í hesum máli, sigur hann.

– Allir partar eru samdir um, at ein tunnil liggur best fyri niðri í dalinum, har sum NCC hevur bjóðað sær til at gera hann.

– Verður úrslitið av kanningunum, at tað ber til at gera tunnilin niðri í dalinum fyri ein prís, sum kann metast at vera fíggjarliga forsvarligur, og játtan fæst til tað, skal ongin ivi vera um, at Landsverkfrøðingurin fer at mæla til loysn har á leiðini, kanska við einum sindri av tillagingum, sigur Oyvindur Brimnes.

Men hinvegin vísir hann eisini á, at tunnilin, sum ætlanin hevur verið at fara undir longur uppi í fjallinum, er á sama støði sum aðrir tunlir og vegir í Føroyum.

Tá ið spurningurin um Hovstunnil tók seg upp, kannaði Jarðfrøðisavnið eisini økið niðri í dalinum, har NCC hevur bjóðað sær at gera tunnil og sum nú verður kannað umaftur. Talan var tá um eygleiðingar og tær kanningarnar vístu, at at fjallið er ov vánaligt at gera tunnil í.

Hinvegin vístu hesar kanningar, at longri uppi, har Landsverkfrøðingurin hevur mælt til at gera tunnilin, er fjallið nógv betri.

Síðani vórðu nakrar boriroyndir gjørdar í hesum góða hamrinum og hann staðfesti metingina hjá Jarðfrøðisavninum, at har var gott at gera tunnil.

– Soleiðis hevur framferðin altíð verið, tá ið vit hava borað tunlar í Føroyum. Vit hyggja fyrst eftir, hvar ein tunnil liggur frægast. Við fyribils kanningum verður s omett um, antin tað ber til at gera tunnil har. Verður mett, at tað ikki ber til, verður eitt annað stað funnið. Vísa innleiðandi kanningar, at tað ber til at gera tunnilin har, verða nágreiniligari kanningar settar í verk har og tað er sama framferð, sum er brúkt her.

– Vit fara ikki fyrst at gera nágreiniligar á teimum støðum, har fyribils metingarnar vísa, at fjallið er vánaligt, tá ið hitt staðið er á hædd við tunlar og vegir í Føroyum annars.

– Men er útgerðin nú á døgum so góð, at tað ber til at bora ígjøgnum hvat sum helst fyri ein forsvarligan prís, er ein nýggj støða, sum vit mugu taka støðu til, leggur Oyvindur Brimnes afturat.

Ongin mannskaði

Bilførararnir á tveimum bilum sluppu væl frá tí, tá ið teir stoyttu saman í Hvítanesvegnum mánakvøldið

FERÐSLUÓHAPP
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Ongin meiðslaði seg, tá ið tveir bilar rendu á hvønn annan á Hvítanesvegnum í Hoyvík mánakvøldið.

Tað var beint eftir klokkan níggju mánakvøldið, at tveir persónbilar rendi saman á Hvítanesvegnum, beint við Mannbrekku.

Førarin á einum bili, sum kom norðureftir, misti tamarhaldið á bilinum, so at hann kom yvir í vinstru síðu og rendi á einum bil, sum kom suðureftir.

Tað vóru bara teir báðir bilførararnir í bilunum og hóast onkrir snuddir vóru, staðfesti kanningar á Landssjúkrahúsinum, at ongin skaði var hendur, men bilarnir fóru rættiliga illa.

Løgreglan veit ikki, hví tann eini bilførarin misti tamarhaldið á bilinum.